Eftir øksarálopið:

10 UNGFÓLK NIÐURÍMILLU

Sum er, hava vit ikki skipanirnar til at lofta og hjálpa eini 10 ungum føroyingum við víðfevndum og samansettum sosialum, sálarligum og rúsevnatrupulleikum. Tey eru ikki før fyri at taka sær av sær sjálvum, og tey eru ein vandi bæði fyri seg sjálv og onnur. Tað sigur arbeiðsbólkur, sum hevur gjørt tilmæli um tilboð til ung við serliga stórum og samansettum trupulleikum

MILDRIÐ JACOBSEN

MILDRID@SOSIALURIN.FO

– Vit kunnu staðfesta, at tað eru ung í Føroyum, sum hava álvarsligar trupulleikar av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, harðskapi, prostitutión og øðrum lógarbrotum, sigur arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt tilmæli um tilboð til ungar føroyingar, sum hava serliga stórar og samansettar trupulleikar at dragast við.

Talan er um eini 10 ung fólk, sum verandi skipan ikki megnar at hjálpa, og sum tí detta niður-ímillum, stendur í tilmælinum. Tey flestu eru mannfólk millum 18-30 ár.

Arbeiðsbólkurin varð settur at arbeiða við at gera tilmæli um tilboð til ung við serliga stórum og samansettum trupulleikum eftir øksarálopið á vegamótinum Íslandsvegur/Landavegur í mai í fjør, tá ein maður varð álopin eftir eina veitslu, sum byrjaði í vardum bústaði hjá ungum manni, ið var dømdur í varðveitslu hjá Almannaverkinum.

Nógvar orsøkir til misnýtslu og lógarbrot

Í tilmælinum stendur, at orsøkirnar til, at hesi ungu fólkini enda í misnýtslu og lógarbrotum, eru fleirfaldar og torgreiddar.

Í fleiri førum er talan um børn, sum eru vaksin upp í illa virkandi familjum, har tey ikki hava fingið neyðugu umsorganina. Í øðrum førum er talan um børn við umfatandi sálarligum sjúkum, ADHD ella autismu, ið hava ilt við at fóta sær, tí tey hava ikki fingið røttu hjálpina rættstundis.

Talan kann eisini vera um ung, sum ikki hava fingið staðfest nakra sálarliga sjúku ella diagnosu, og sum eru vaksin upp í vælvirkandi familjum, men har talan kann vera um goymdar avbjóðingar, sum hava við sær, at tey koma á skeiva leið.

Fleiri skipanir gera í hvør sínum lagi sítt fyri at veita viðgerð, hjálp og stuðul til hesi ungu. Men alt ov ofta ger tað seg tó galdandi, at almennu fyriskipanirnar ikki røkka hesum ungu, og at viðgerðartilboðini ikki megna at lofta og hjálpa teimum, staðfestir arbeiðsbólkurin.

Slept upp á fjall

Samanumtikið er talan um ung fólk, sum stríðast við ymiskar, samansettar og sera víðfevndar trupulleikar, so sum sálarórógv ella psykiatriska diagnosu, atferðartrupulleikar, umsorganarsvík, menningartarn, rúsevnamisnýtslu, lógarbrot og avvíkjandi seksuellan atburð.

– Tey kenna tað, sum um at tey eru slept upp á fjall, og at tey skulu brúka eina rúgvu av tíð og orku upp á at finna fram til, hvør hevur ábyrgd av hvørjum og at senda umsóknir v. m. til ymiskar myndugleikar, sigur arbeiðsbólkurin, sum hevur tosað við ung, ið sótu í varðhaldi í Mjørkadali, og sum hava tilknýti til ymiskar myndugleikar.

Ungu fólkini vildu fegin, at tað varð staðfest, hvør hjálpir teimum og møtir teimum, har sum tey eru, og sum

